HB-NSÍ:

# NSÍ aftur í Gundadali

**Runavíkingar skulu annan dystin á rað á vitjan í Gundadali. Hesaferð verður mótstøðuliðið greipuvinnararnir úr HB, sum skulu hava stig sunnudagin**

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Runavíkingar fingu eina dreymabyrjan upp á kappingarárið, tá ið teir vunnu trupla útidystin móti B36 í fyrsta umfarinum, sum var leikt mánadagin. Sunnudagin eru teir aftur á vitjan í Gundadali, men mótstøðumenninir úr HB skulu hava stig.

### Altíð trupult í Gundadali

Hjá runavíkingum eru allur mans klárir til dystin móti HB. Ein av stuðulsleikarunum hjá NSÍ, Helgi L. Petersen, sigur, at tað er altíð trupult í Gundadali, óansæð um mótstøðuliðið eitur HB ella B36.

- Tað verður ein ógvuliga trupul dystur, men vit trúgva upp á møguleikan og fara eftir øllum trimum stigunum, sigur hann.

Tað verður mangan sagt, at júst dystirnir millum hesi bæði liðini, HB og NSÍ, eru undirhaldandi og ferðmiklir dystir, og Helgi L. Petersen ivast ikki í, at áskoðararnir fara at fáa nakað fyri pengarnar.

- Liðini standa væl til hvønn annan. Tá ið vit hittust í steypakappingini, var lítil munur á, men vit høvdu ikki marginalarnar við okkum, og tí vóru tað teir, ið komu víðari. Vit ivast tó ikki í, at vit kunnu vinna dystin sunnudagin, og tí fara vit við góðum treysti inn á vøllin, sigur Helgi L. Petersen.

### Skulu hava stig á heimavølli

Føroyameistararnir úr HB byrjaðu aftur í ár kappingarárið við einum ósigri, men liðskiparin, Rúni Nolsøe, sigur, at sunnudagin er alneyðugt at fáa trý stig í hús.

- Tað er eitt krav hjá okkum at fáa trý stig sunnudagin. Annars verður gloppið ov stórt, og vit hava VB á útivølli í næsta umfari, og tað er altíð ein trupul dystur, sigur Rúni Nolsøe.

Í HB kunnu tey fegnast um, at veteranurin Hallur Danielsen, sum ikki var við í Klaksvík, er tøkur aftur, men Vagnur Mohr Mortensen, Heine Fernandez og Rani Christiansen eru framvegis skaddir. Vagnur er tó farin at renna aftur, so tað gongur neyvan rúm tíð, áðrenn hann verður aftur at síggja á vøllinum.

Um dystin móti NSÍ sunnudagin sigur Rúni Nolsøe, at tað verður ein trupul uppgáva, tí NSÍ er eitt gott lið, sum hevur eitt sindur av viðgongd í løtuni.

- Vit vunnu á teimum í steypakappingini, men tá var munurin lítil. Hinvegin skulu vit hava øll trý stigini á heimavølli, um vit ætla at blanda okkum upp í oddastríðið, sigur liðskiparin hjá HB.

**Formula-deildin**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skála | 1 | 1 - 0 - 0 | 5 | 1 | 4 | 3 |
| 2 KÍ | 1 | 1 - 0 - 0 | 4 | 3 | 1 | 3 |
| 3 EB/Streymur | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 4 NSÍ | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 5 ÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 6 HB | 1 | 0 - 0 - 1 | 3 | 4 | -1 | 0 |
| 7 GÍ | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 8 VB/Sumba | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 9 B36 | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 10 TB | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 5 | -4 | 0 |

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 8 | 8 - 0 - 0 | 715 | 438 | 277 | 29 |
| 2 Stjørnan | 9 | 8 - 0 - 1 | 656 | 445 | 211 | 29 |
| 3 Neistin | 8 | 5 - 0 - 3 | 619 | 471 | 148 | 20 |
| 4 Søljan | 9 | 4 - 0 - 5 | 614 | 542 | 72 | 16 |
| 5 VÍF | 8 | 4 - 0 - 4 | 521 | 503 | 18 | 13 |
| 6 Kyndil | 8 | 3 - 0 - 5 | 441 | 588 | -147 | 9 |
| 7 StÍF | 8 | 1 - 0 - 7 | 475 | 601 | -126 | 7 |
| 8 Tjaldur | 8 | 0 - 0 - 8 | 314 | 767 | -453 | 0 |

ÍF-GÍ:

# Seytjan ár síðani ÍF fekk fult

**Eftir fyrsta sigurin í Vági 26 ár eru fuglfirðingar spentir uppá, um tað fyri fyrstu ferð síðani í 1988 fer at eydnast at vinna á heimavølli ímóti GÍ**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*ÍF hevur ikki fingið fult móti GÍ, síðani teir í 1988 vunnu á grannunum*

Eftir at fótbólturin í Fuglafirði í eina fjórðings øld hevur staðið í skugganum av grannunum í Gøtu, hevur tað ikki verið sørt í hesi vikuni, at tað hevur verið tosað um møguleikan, at tað í morgin - fyri fyrstu ferð síðani í 1988 - skal eydnast at fáa fult, tá ið GÍ vitjar.

2. páskadag vann ÍF 1-0 í Vági. Talan var ikki um fyrsta sigurin nakrantíð har suðuri. Eina ferð áður hevur ÍF vunnið í Vági. Tað var í 1979, tá ið ÍF varð meistari. Úrslitið ta ferðina var eisini 1-0. Málskjútti var Meinhardt Dalbúð, sum var toppskjútti í meistaradeildini hetta árið.

– Eg minnist dystin í Vági væl. Tað var neyðugt hjá okkum at vinna fyri at varðveita FM møguleikan. Vit høvdu fleiri góðar møguleikar, og eg misnýtti fleiri ferðir. Mikkjal Mikkelsen, sum fyri tað mesta spældi við HB, var hetta árið málverji hjá VB, og hann stóð framúr væl. Men vit fingu málið, sum skuldi til fyri at fáa bæði stigini, og tað var eisini orsaka av tí úrslitinum, at vit vunnu meistaraskapin, minnist Meinhardt Dalbúð, og hann fegnast um, at tað nú eydnaðist barndómsfelagnum at vinna í Vági.

At tað hilnaðist væl 2. páskadag hevur havt við sær, at fótbóltshýrurin í hesi vikuni hevur verið góður í Fuglafirði. Tað hevur sást aftur í, at tað hevur verið tætt millum bilarnar og áskoðararnar, sum í góðveðrinum hava fylgt venjingunum.

Allir spælararnir, sum vóru við í Vági, eru tøkir. Spurningurin er, um Petur Simonsen enn eina ferð fer at geva teimum somu ellivu møguleikan frá fyrsta bríksli, ella um hann fer at geva Bartali Eliasen og Magna á Lakjuni møguleikan. Teir vórðu báðir skiftir inn í Vági.

– Gøtumenn hava í mong ár havt takið á ÍF. Tað kann gerast eitt kompleks, men nú upp undir dystin hava vit tosað um týdningin av, at vit veruliga trúgva upp á tað, tá ið vit fara á vøllin, og eg haldi, at okkara eru ógvuliga uppsettir, sigur ÍF venjarin Petur Simonsen. Hann roknar uppgávuna ikki at verða vorna lættari, eftir at GÍ tapti á heimavølli ímóti EB/Streymi.

### Sámal tøkur

Ímóti EB/Streymi hevði GÍ ongan upplagdan málmøguleika. Miðvøllurin kendist tunnur, og í Gøtu vóru teir illa nøgdir við keturnar og samstarvið millum keturnar. Súni Olsen og Popczynski eru ivaleyst teir, ið best eru førir fyri at skapa nakað, men teir vóru báðir í fremstu plássunum. Tí kann kanska roknast við, at onkrar rættingar fara at verða gjørdar í uppstillingini.

Veteranurin Sámal Joensen varð skaddur undir venjing stutt undan dystinum ímóti EB/Streymi. Hann er nú komin fyri seg aftur eftir vøddaskaðan, og tað verður mett sum stórur styrkur fyri miðvøllin, at hann er tøkur aftur. Magni Jarnskor er framvegis so mikið skaddur, at hann ikki verður førur fyri at spæla í morgin.

Ætlanin var, at klaksvíkingurin Meinhardt Joensen skuldi venja GÍ málið í ár. Hann hevur gingið við arminum í gipsi. Tað skuldi takast av aftur í gjár, men í Gøtu rokna teir við, at tað fara at ganga fleiri vikur, áðrenn hann aftur verður førur fyri at venja og spæla. Hallur Hansen kom undan páskafrítíðini úr Danmark og til Gøtu, og hann fer eisini í morgin at verja GÍ málið.

## Tølini tala

| | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KÍ-VB | 0-0 | 2-2 | 0-0 | 4-1 | 2-2 | 2-1 | 2-1 | 3-2 | 2-2 | 1-2 | 4-5-1 | 18-13 |
| HB-NSÍ | 1-0 | 1-0 | 4-0 | 0-0 | 2-5 | 1-3 | 2-1 | 2-2 | - | 0-0 | 4-3-2 | 13-11 |
| TB-B36 | - | - | 2-8 | - | - | - | 1-1 | - | 0-3 | 3-2 | 1-1-2 | 6-14 |
| EB/S-Skála | 0-1 | 1-0 | 1-0 | - | - | - | - | - | - | - | 2-0-1 | 2-1 |
| ÍF-GÍ | 1-2 | - | - | - | - | 1-5 | 0-4 | 0-4 | 1-1 | - | 0-1-4 | 3-16 |

*Talvan sýnir, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi dystunum seinastu tíggju árini*

TB-B36:

# B36 er stórfavorittur

**Tað er ikki nøkur løtt uppgáva, ið TB fær sunnudagin, tá ið teir spæla fyrsta heimadystin á árinum**

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er einki at ivast í, at tað er eitt B36-lið, ið er ógvuliga svangt eftir stigum, ið kemur suður á Sevmýri at vitja uppflytararnar sunnudagin. Hinvegin stendur TB seg vanliga væl á heimavølli, og teir hava gott mót til dystin móti árstalsfelagnum.

### Obe verður við

Tá ið B36 noyddist at lúta fyri NSÍ 2. páskadag, var nýggi suðurafrikanski framherjin, Obe, ikki við á liðnum, tí at pappírini hjá honum ikki vóru komin í rættlag. Nú skuldi hesi viðurskifti verið komin upp á pláss, so hann er ivaleyst við í hópinum sunnudagin. Somuleiðis er væntandi, at krumtappurin á miðvøllinum, Klæmint Matras, verður klárur sunnudagin, eftir at hann ikki var við móti runavíkingum vegna skaða. Liðskiparin hjá B36, Pól Thorsteinsson, sigur, at tað er einki at ivast í, at teir skulu hava trý stig á Sevmýri sunnudagin.

- Vit kundu við eitt sindur av hepni vunnið móti NSÍ, men vit vóru ikki nóg neyvir í avgerandi løtum. Kanska hevði NSÍ fleiri opnar møguleikar, men tað kundi farið báðar vegir. Eg ivist ikki í, at vit koma sterkt aftur sunnudagin, sigur Pól Thorsteinsson.

### Skulu upp í ferð

TB fekk ein sekk í fyrstu royndini í bestu deildini í hesum kappingarárinum. 1-5 ósigurin inni á Skála var ikki nøkur ynskibyrjan, men tvøramenn hava tó gott mót til dystin sunnudagin.

Allir mans eru klárir til dystin, og sambært einum av veteranunum á liðnum, Jón Johannesen, sært tað heilt gott út til dystin móti B36.

- Eg haldi, at úrslitið á Skála er eitt sindur misvísandi. Hinvegin var tað óheppið fyri okkum, at vit skuldu byrja kappingarárið júst á Skála, tí har hava vit fingið nakrar ordans lússingar seinastu ferðirnar, ið vit hava vitjað, sigur Jón Johannesen.

Sambært Jón var ein av trupulleikunum inni á Skála tann, at skálamenn leikt í einum nógv hægri tempo enn tvøramenn gjørdu.

- Vit noyðast upp í tempo, og harafturat ræður tað um hjá okkum, at allir mans standa rætt á vøllinum. Gera vit tað, so havi eg góðar vónir til dystin sunnudagin. Vit plaga vanliga at standa okkum væl á Sevmýri, og tað er til okkara fyrimun, at B36 er stórfavorittur at vinna dystin, sigur Jón Johannesen.